# føroyskan politikk





*Annfinnur sum Gaston og sum Cogsworth í Beauty and the Beast. Høgrumegin sæst Preben Kristensen*
Mynd: Henrik Lund

Eg meini so við, sjálvandi býr okkurt politiskt undir eini drotningavitjan. Allíkavæl uppføra vit føroyingar okkum hvørja ferð, sum at hetta bara er ein fitt eldri dáma, sum kemur á eina hugnaliga vitjan at deila riddarakrossar út og halda røður, sum hon sjálv hevur skrivað…

Fyri nógv var Drotningarøðan fyrst og fremst skemt, og tað var eisini ein partur av ætlanini. Men Anfinnur heldur, at politiskir leikir, eisini av hesum slagi, kunnu verða við til at broyta okkum sum menniskju og í síðsta enda kanska eisini skapa eitt betri samfelag.

- Also, við at vísa okkum sjálvum og øðrum, hvussu vit eru, kann sjónleikur blíva eitt boð uppá, hvussu vit kanska heldur áttu at verið. Tá tað eydnast, trúgvi eg veruliga, at tað ber til at broyta heimin. Eg vil gera leikir, sum fáa okkum at seta spurnartekin við, hví vit eru, sum vit eru, leikir, sum rykkja okkum út úr okkara sjálvrættvísa nøgdsemi, har summi eru inni og onnur úti, sigur Annfinnur.

Hatta ljóðar øgiliga idealistiskt ...

- Tað er tað eisini. Og eg eri púra greiður yvir, at tað, sum eg geri beint nú fyri at fáa breyð á borðið, hvørki er serliga idealistiskt ella politiskt. Musical er ikki list. Tað er bara gott handverk og gott undirhald, og tað skal eisini til. Ongin orkar at noyðast upp hvønn morgun at broyta heimin, men sum sjónleikari havi eg kanska møguleikan av og á. Spurningurin er so, um eg ikki eisini havi skyldu til at brúka hann.

### Ginusøgur á tingi

At brúka hendan møguleikan í Føroyum er ikki bara freistandi, men púra eyðsýnt, tí sambært Annfinni er føroyska samfelagið sum skraddaraseymað til leikir um politiskt ella eldfim evni.

- Vit sóu jú, hvat hendi við Ginusøgum, sigur Annfinnur, sum illa dugir at ímynda sær, at eitt sovorðið evni bleiv tikið upp til alment kjak í Føroyum, um tað ikki var, tí ein sjónleikur hevði sett tað á plakatina.

- Onkrir av landsins kosnu monnum hóttu enntá við at skarva 400.000 av játtani til Leikpall Føroya sum hevnd fyri Ginusøgur, hóast teir ikki høvdu sæð leikin. Ikki, at nakar tók teir fyri fult, men allíkavæl– leikurin førkaði heiminum nøkur stig eina løtu, og tað er tað, sum sjónleikur kann, og skal. Beint nú hevði tað til dømis verið upplagt at gjørt ein leik um grotesku handfaringina av útlendingamálunum, og hvussu við rættindunum hjá teimum samkyndu? Menningarhjálpin og allur dupultmoralurin, sum hartil hoyrir, fyri ikki at tala um alt fullveldismálið. Har er nokk at tríva í.

Trupulleikin er ikki, at føroyingar ikki vilja kjakast um viðkvom evni. Men ein kjakmentan, sum er kjølfest í einum samfelag, sum ongantíð noyðist at taka evstu ábyrgd fyri sínum avgerðum, fær illa verðið annað enn ilsinnisgleps og persónligt runublakaríð, heldur Annfinnur. Tí hevur leiklistin og list yvirhøvur kanska eina serliga uppgávu at røkja í Føroyum við at skapa neyðugu frástøðuna, so vit fáa sæð og viðgjørt okkum sjálvi í einum størri høpi.



*Føroyski hugburðurin til danska kongshúsið fekk ikki so fá prik, tá Annfinnur Heinesen og Allan Dalsgarð framførdu teirra Drotningarøðu á Ólavsøku í ár*
Mynd: Høgni Heinesen

## Beauty and the Beast á Det Ny Teater

Leikurin er fyrsti Disney sangleikur, sum verður framførdur í Norðurlondum
Við meir enn 200.000 áskoðaður um árið er Det Ny Teater mest vitjaða leikhúsið í Danmark
Pláss er fyri gott 1000 áskoðarum
Beauty and the Beast er størsta skandinaviska leikuppseting nakrantíð og kostar 100 mill. kr.
Fleiri enn 100 leikarar eru við í leikinum.
Sangleikurin byggir á leikin hjá Disney Productions, sum hevur verið sýndur á Broadway uttan íhald síðani 1994.
Beauty and he Beast hevur verið sýndur í 14 londum kring heimin fyri fleiri enn 25 mill. áskoðarum

### Føroyskar fyrimyndir

Hóast sjónleikur, sum politikst íkast, er nærum ódyrkað lendi í Føroyum, heldur Annfinnur tað hinvegin vera ófatiligt, at føroyska leiklistin er komin so langt, sum hon er. At vit í dag hava ein Tjóðpall, kunnu vit takka nøkrum ótroyttiligum eldsálum, ikki minst í áhugafeløgunum fyri, sum uttan pengar ella umstøður hava ment eitt sjónleikarumhvørvi, vit øll kunnu vera errin av, sigur Annfinnur og sendir samstundis ein vinarligan tanka til Adelborg Linklett og Edward Fuglø, sum góvu Annfinni hansara fyrsta leiklut í Brøðurnir Leyvuhjarta.

- Tað vóru fólk, sum hesi og seinni tey í Grímu, ið góvu mær íblástur og hug at fara á sjónleikaraskúla. Tey eru framvegis mínar fyrimyndir, og mín dreymur er at koma heim til Føroyar at spæla saman við teimum aftur, sigur Annfinnur, sum eisini er farin at leingjast eftir at sleppa at spæla á føroyskum aftur.

- Tað tók mær tvey ár við serundirvísing at bróta tær donsku málsligum forðingarnar. Áðrenn tað, ljóðaði tað bara sum, at eg tosaði danskt, men eg føldi ikki veruliga tað, sum eg spældi. Í dag eri eg takksamur fyri hava lært eitt annað mál so væl, men onki kann samanberast við kensluna, tá klangbotnurin er har beinanvegin, og tú kanst spæla frá hjartanum. Danskurin (Grundtvig) sigur tað jú so gott: "Modersmålet er hjertets sprog".

### Ómentað Visjón 2015

- Nú fáa vit at síggja um Tjóðpallinum verður lív lagað. Jenny Petersen ger eitt gott arbeiði, men tað er ringt at vinda vatn úr gróti. Vit hava fingið eitt fínt heiti, men enn hevur politiski viljin ikki givið okkum neyðugu figgjarligu karmarnar, sigur Annfinnur sum fýlist á, at Visjón 2015 bert tykist snúgva seg um kappingarføri og marknaðaratgongd.

- Pengar snara kanska verðini runt, men tað eru onnur virðir sum geva okkum kjølfesti sum føroyingar. Tað andaliga og sosiala tilfeingið skapar okkum sum menniskju og tað kann ikki metast í krónum og oyrum. Í hesum globala meldrinum er tað ikki longur ein sjálvfylgja at vita, hvør man er, og tí mugu vit gera okkum greitt, at eitt lítið land hevur brúk fyri eini sterkari mentan, og so raðfesta hareftir.